# Dygdarhandbók

*- leiðreglur fyri arbeiðið í Barnahúsinum*

**Mars 2022**

”Dygdarhandbókin er eitt felags fakligt amboð hjá Barnahúsinum og teimum, ið luttaka í samstarvinum har. Endamálið við hesi handbók er at lýsa serligu førleikarnar, ið skulu til, tá ið mál um ágang móti børnum ella ungum verða viðgjørd. Leiðreglurnar skulu seta sín dám á tilgongdina í slíkum málum kring alt landið og skulu stuðla undir, at Barnahúsið virkar eftir einum dygdargóðum og serkønum leisti, sum er í støðugari menning.”

## Innihaldsyvirlit


1. Inngangur ... 3
2. Barnahúsleisturin ... 3
3. Endamál ... 4
4. Lógargrundarlag ... 4
5. Málbólkur og málsøki ... 5
6. Í minsta lagi tveir samstarvspartar ... 6
7. Mál um revsiverd viðurskifti ... 6
8. Avhoyring av ungum ... 6
9. Foreldur ella avvarðandi hjá barninum ella ungfólkinum ... 7
10. Málsviðgerar innan barnaverndartænasturnar ... 7
11. Mál, ið ikki koma undir málsøkið hjá Barnahúsinum ... 8
12. Innrætting av Barnahúsinum ... 8
13. Starvsfólkið hjá Barnahúsinum ... 9
14. Virksemi í Barnahúsinum ... 9
15. Stig í málsgongdini ... 10
    1) Ráðgeving ... 11
    2) Byrjan og fyrireiking ... 11
    3) Løgreglukanning ... 13
    4) Samráð ... 14
    5) Kreppuhjálp og skreening/kanning ... 15
    6) Afturboðan ... 15
16. Málsgongdir í bráðfeingis málum ... 16
17. Tvørfakliga samstarvið ... 16
18. Samstarvsavtalur og mannagongdir ... 17
19. Førleikamenning í Barnahúsinum ... 17
20. Dátuskráseting og skjalfesting ... 17
    Hvussu goyma vit upplýsingar? ... 18
    Hvussu leingi goyma vit persónsdátur? ... 18
    Víðarigeving ... 18
    Rættindi ... 18
21. Aðrar viðkomandi reglur um at lata upplýsingar sínámillum og samstarva ... 19
    Barnaverndarlógin ... 19
    Fyrisitingarlógin ... 19
    Persónsupplýsingarlógin ... 20
    Rættargangslógin ... 20

# 1. Inngangur

Barnahúsið fevnir um eitt samskipað samstarv, ið røkkur tvørtur um fleiri starvs- og fakøki, og sum tryggjar, at mál um kynsligan ágang og annan harðskap ímóti børnum og ungum verða viðgjørd í einum barnavinarligum umhvørvi, har barnið ella ungfólkið er í miðdeplinum.
Dygdarhandbókin er eitt felags fakligt amboð hjá Barnahúsinum og teimum, ið luttaka í samstarvinum har. Endamálið við hesi handbók er at lýsa serligu førleikarnar, ið skulu til, tá ið mál um ágang móti børnum ella ungum verða viðgjørd. Leiðreglurnar í handbókini skulu seta sín dám á tilgongdina kring alt landið og skulu stuðla undir, at Barnahúsið virkar eftir einum dygdargóðum og serkønum leisti, sum er í støðugari menning.

Hesar leiðreglur taka støði í lógarásetingunum um Barnahúsið. Leiðreglurnar lýsa harumframt fleiri vegleiðandi mannagongdir um arbeiðið hjá Barnahúsinum, bæði tá ið tað snýr seg um ítøkilig mál, sum Barnahúsið hevur um hendi, og tá ið talan er um ráðgevandi stuðulin, sum Barnahúsið veitir barnaverndartænastunum kring landið, har mál um ágang taka seg upp.

Mál um ágang kunnu vera sera ymisk, og børn og ung, ið hava verið fyri ágangi, kunnu hava nógvar ymiskar trupulleikar og ymiskan tørv. Tá ið avgerð verður tikin um, hvørjar fyriskipanir skulu setast í verk, skal tískil metast nágreiniliga og ítøkiliga um hvørt einstakt mál sær í Barnahúsinum.

Felags vitanin hjá Barnahúsinum um hvørt einstakt barn ella ungfólk skal bæði taka støði í viðurskiftunum í hvørjum einstøkum føri og í eini heildarmynd, ið er barnavinarlig og røkkur tvørtur um fakmark. Hetta verður gjørt fyri, at málsgongdin í hvørjum einstøkum føri kann verða fyriskipað á ein hátt, ið tekur mest gjørligt fyrilit fyri einstaka barninum ella ungfólkinum.

Handbókin lýsir fyrst ætlanirnar og endamálið við Barnahúsinum. Lýst verður síðani, hvønn málbólk Barnahúsið vendir sær til, hvat málsøkið hjá húsinum er, hvussu stovnurin er samansettur, og hvørji starvsfólk arbeiða hjá Barnahúsinum. Greitt verður frá, nær barnaverndartænasturnar hava møguleika – og skyldu - til at heita á Barnahúsið um hjálp við viðgerð av einum ávísum máli. Síðani verður lýst, hvussu mál verða viðgjørd í Barnahúsinum, og hvussu arbeitt verður víðari við málum, har talan er um ágang. Harumframt verða vegleiðandi mannagongdir hjá Barnahúsinum í sambandi við mál um ágang lýstar. At enda verða tey krøv lýst, ið eru um dátuskráseting og skjalfesting av virkseminum í Barnahúsinum.

# 2. Barnahúsleisturin

Barnahúsið tekur støði í norðurlendska barnahúsleistinum, sum byggir á samstarv tvørtur um kommunu- og fakmørk. Barnahúsið veitir ráðgeving í sambandi við

barnafakligu kanningina í málum, har illgruni ella vissa er um, at eitt barn ella ungfólk undir 18 ár hevur verið fyri ágangi, og har tað er neyðugt at taka løgregluna ella sjúkrahúsverkið upp í málið. Avvarðandi barnaverndartænasta hevur myndugleikaábyrgdina, meðan málið verður viðgjørt í Barnahúsinum.

Barnahúsið er mannað við føstum serútbúnum starvsfólkum, ið hava serkunnleika at taka sær av málum um ágang ímóti børnum og ungum. Harumframt kann Barnahúsið heita á serkøn fólk frá eitt nú løgregluni og sjúkrahúsverkinum eftir tørvi.

Barnahúsið er eitt barnavinarliga innrættað hús, har avvarðandi myndugleikar kunnu savnast, soleiðis at eitt barn ella ungfólk, ið hevur verið fyri ágangi, ella har illgruni er um hetta, kann kannast, greinast og fáa kreppuhjálp saman við teimum avvarðandi.

Ein grundhugsan í barnahúsleistinum er, at avvarðandi myndugleikar møta barninum ella tí unga í Barnahúsinum, og at teir, so frægt sum til ber, gera sítt arbeiði inni í Barnahúsinum. Felags serkunnleikin skal tryggja, at arbeiðið við hvørjum einstøkum barni ella ungfólki verður gjørt við støði í eini heildarmynd, ið er barnavinarlig og røkkur tvørtur um arbeiðsmark hjá teimum, ið kanna málið. Hetta verður gjørt við tí endamáli, at hvør einstøk málsgongd kann verða fyriskipað á ein hátt, ið tekur mest gjørligt fyrilit fyri hvørjum barni ella ungfólki.

## 3. Endamál

Høvuðsendamálið við Barnahúsinum er at tryggja dygdargott, væl skipað og umhugsið tvørfakligt arbeiði við børnum og ungum – umframt familju ella avvarðandi annars – í málum um ágang. Eisini skal Barnahúsið tryggja, at mál um kynsligan ágang ella annan harðskap fáa somu dygdargóðu viðgerð kring alt landið.

Endamálið við at savna serkønu, tvørfakligu og samskipaðu viðgerðina av málum um ágang ímóti børnum ella ungum saman í Barnahúsinum er, at barnið ella ungfólkið fær betri umstøður at verða kannað og fær betri umstøður at koma fyri seg eftir ágangin.

## 4. Lógargrundarlag

Í § 10 a sum varð dagførd við lógini um barnavernd frá 18. desember 2013 verður ásett, at Barnahúsið virkar sum karmur um tvørfakligt samstarv, tá børn undir 18 ár hava verið fyri kynsligum ágangi ella øðrum harðskapi, ella tá illgruni er um, at hesi eru ella hava verið fyri kynsligum ágangi ella øðrum harðskapi.

Sambært lógarbroytingini kunnu løgregla, ákæruvald, sosialir myndugleikar, heilsumyndugleikar, løggild heilsustarvsfólk og starvsfólk hjá Barnahúsinum í

sambandi við málsviðgerð lata upplýsingar um heilt privat viðurskifti hjá barninum og familjuni ímillum sín, tá umhugsni fyri viðurskiftum barnsins fer fram um fyrilitið fyri teimum áhugamálum, ið geva grund fyri dyljan.

## 5. Málbólkur og málsøki

Málbólkurin hjá Barnahúsinum er:

*Børn og ung í aldursbólkinum undir 18 ár, ið hava verið fyri ágangi – tað er kynsligum ágangi ella øðrum harðskapi – ella í teimum førum, tá illgruni er um slíkan ágang.*

Nærmastu avvarðandi hjá barninum ella tí unga kunnu fáa kreppuhjálp við tí endamáli, at tey verða betri før fyri at handfara støðuna hjá barninum ella ungfólkinum og veita teimum umsorgan.

Barnahúsið veitir harumframt ráðgevandi stuðul til barnaverndartænastur, ið hava ítøkilig mál um hendi, har illgruni ella vissa er um kynsligan ágang ella annan harðskap. Barnahúsið veitir eisini ráðgeving í málum, har illgruni er um ágang.

Barnahúsið skal nýtast í málum um ágang, tá

1) barnaverndartænastan við støði í illgruna ella vissu um ágang móti einum barni ella ungfólki undir 18 ár skal fremja eina barnafakliga kanning sambært § 45 í barnaverndarlógini ella eina ískoytiskanning av viðurskiftunum hjá barninum ella ungfólkinum, og

2) tá neyðugt er við tvørfakligum samstarvi (millum barnaverndartænastuna, løgregluna og/ella sjúkrahúsverkið).

Talan kann bæði vera um hendingar, ið júst eru farnar fram og um viðurskifti, ið liggja longur afturi í tíð, men sum nústani eru komin undan kavi.

## 6. Í minsta lagi tveir samstarvspartar

Mál, sum byrja í Barnahúsinum, skulu sum meginregla fevna um ágang, ið krevur tvørfakligt samstarv millum barnaverndartænastu, løgreglu og/ella sjúkrahúsverk. Tískil skal tað – umframt barnaverndartænastuna – altíð vera í minsta lagi ein annar samstarvspartur við í viðgerðini av málinum.

Hetta merkir, at Barnahúsið sum meginregla ikki skal nýtast í málum, um løgreglan og/ella sjúkrahúsverkið ikki er við í viðgerðini, til dømis í førum har eitt barn fremur ágang móti øðrum barni.

## 7. Mál um revsiverd viðurskifti

Sum grundregla snúgva tey mál, sum koma undir málsøkið hjá Barnahúsinum, seg um illgruna um revsiverd viðurskifti, og um viðurskifti, har neyðugt er við tvørfakligum samstarvi um málið. Hetta er galdandi uttan mun til, um ágangurin ímóti barninum ella tí unga júst er framdur, ella um hann varð framdur fyrr í lívinum hjá viðkomandi.

Í hesum sambandi skal viðmerkjast, at løgreglan kann takast inn í mál, ið snúgva seg um eitt barn ella ungfólk, sum hevur verið fyri ágangi frá einum øðrum barni ella ungfólki, sum er yngri enn 15 ára revsialdurin, hóast talan í hesum føri ikki er um revsimál. Løgreglan kann til dømis skráseta upplýsingar um eitt mál, ið er framt av einum 13 ára gomlum, og í álvarsligum málum kann løgreglan taka avgerð um at avhoyra eitt barn ella ungfólk, ið hevur verið fyri ágangi frá einum øðrum barni ella ungfólki undir 15 ár. Umboð fyri avvaðandi barnaverndartænastu eigur at vera hjástatt.

## 8. Avhoyring av ungum

Børn undir 15 ár verða sum útgangsstøði videoavhoyrd í málum um kynsligan ágang. Sambært rættargangslógini § 762, stk. 1 kann løgreglan gera videoavhoyring, við tí fyri eyga at brúka upptøkuna sum prógvførslu í hesum førum:

1. Persónurin er undir 13 ár
2. Persónurin er yngri enn 15 ár, og kanningin er viðvíkjandi lógarbroti á:
    - § 210 í revsilógini ella kapittul 24 ella (kynsligt brotsverk)
    - § 237 í revsilógini ella 244-246 (Brotsverk ímóti lívi/harðskapur), har persónurin ella ein av hansara nærmastu er órættaður, og at tann sum er undir illgruna, er ein av hansara nærmastu
3. Persónurin er undir 18 ár og serligar umstøður tala fyri videoavhoyring

4. Persónurin er 18 ár ella eldri, og hevur álvarsliga sálarliga sjúku ella er munandi skerdur sálarliga ella kropsliga, og serligar umstøður tala fyri videoavhoyring

## 9. Foreldur ella avvarðandi hjá barninum ella ungfólkinum

Foreldur ella avvarðandi umsorganarpersónar hjá einum barni ella ungfólki, ið hevur verið fyri ágangi, ella har illgruni er um ágang, koma eisini undir málbólkin hjá Barnahúsinum. Hetta kann til dømis gera seg galdandi, um eitt barn ella ungfólk hevur verið fyri ágangi, ið er framdur av einum øðrum persóni enn foreldrunum ella teimum avvarðandi, og starvsfólkið í Barnahúsinum metir, at eisini foreldur ella avvarðandi hava tørv á kreppuhjálp til tess at handfara støðuna hjá barninum ella ungfólkinum.

Í teimum førum, har annað av foreldrunum ella stjúkforeldrunum at barninum ella tí unga hevur framt ágangin, ella illgruni er um hetta, er tað sum meginregla tað foreldrið, ið ikki hevur framt ágangin, sum fær bjóðað kreppuhjálp í Barnahúsinum.

## 10. Málsviðgerar innan barnaverndartænasturnar

Starvsfólk innan barnaverndartænasturnar, ið viðgera mál um ágang (ella illgruna um ágang) kunnu fáa ráðgeving í Barnahúsinum.

Harumframt veitir Barnahúsið/Barnaverndarstovan og løgreglan ráðgevandi stuðul til barnaverndartænasturnar í málum, har varhugi er um ágang ímóti einum barni ella ungfólki, og har ivi er um, hvørt talan er um eitt mál, sum kemur undir málsøkið hjá Barnahúsinum.

Onnur fakfólk, so sum lærarar, námsfrøðingar og heilsufrøðingar, skulu leita sær leiðbeining frá tilbúgvingarskipanini, sum barnaverndartænasturnar eiga at hava í sínum øki, um fyribyrging, eftirkannan og handfaring av málum, har illgruni er um ágang.

Harumframt eigur ein námsfrøðilig fyriskipan, ið tekur støði í tilbúgvingini, sum skal byrgja fyri ágangi ímóti børnum, at verða umhugsað á dagstovninum.

## 11. Mál, ið ikki koma undir málsøkið hjá Barnahúsinum

Hesi mál koma sum meginregla ikki undir málsøkið hjá Barnahúsinum:

- Mál um harðskap millum javnaldrar, har í millum harðskapur, sum farin fram í náttarlívinum
- Børn og ung, ið kynsliga fara um mark ella vísa harðligan atburð mótvegis øðrum børnum og ungum í teimum førum, har barnið ella tann ungi er undir revsialdurin (ongin rættarsókn). Tó kann Barnahúsið verða brúkt í málum, ið snúgva seg um eitt barn ella ungfólk, ið hevur gjørt seg inn á eitt annað barn ella ungfólk, um vissa ella illgruni er um, at illtonkta barnið sjálvt hevur verið fyri ágangi, ella ágangurin er av serliga álvarsligum slagi
- Menningartarnað yvir 18 ár, ið hava verið fyri ágangi. Barnahúsið kann tó av sínum eintingum gera avtalu við løgregluna um nýtslu av avhoyringarhølunum hjá Barnahúsinum í slíkum málum. Tó skulu høvuðsuppgávurnar hjá Barnahúsinum altíð raðfestast hægst og mugu ikki ávirkast av málum, ið koma undir omanfyri nevnda bólk

## 12. Innrætting av Barnahúsinum

Barnahúsið er innrættað við tí fyri eyga, at umhvørvið skal vera so barna- og ungdómsvinarligt sum gjørligt, so at barnið ella ungfólkið kann uppliva húsið sum eitt trygt stað.

Innrættingin skal hóska til tær arbeiðsuppgávur, sum Barnahúsið tekur sær av. Millum annað skulu umstøðurnar til videoavhoyring lúka treytirnar, ið ákæruvaldið hevur ásett, og hølini skulu verða tryggjað sambært ávísingum frá løgregluni.

Barnahúsið hevur teir hentleikar, ið eru neyðugir fyri at gera samrøður, kanningar o.a. av barninum ella tí unga. Innrættingin av Barnahúsinum skal millum annað hóska til fylgjandi virksemi:

- Móttøka av barninum ella ungfólkinum og avvarðandi
- Videoavhoyring (við tilhoyrandi lurtirúmi)
- Kreppuhjálp og –viðgerð av børnum ella ungum og foreldrum ella avvarðandi
- Heilsurøktarfrøðiligar kanningar
- Fundarvirksemi
- Skrivstovuarbeiði
- Køkshentleikar
- Vesi og baðihentleikar

## 13. Starvsfólkið hjá Barnahúsinum

Barnahúsið hevur eitt fast starvsfólkatoymi, ið er serútbúgvið og serliga skikkað at taka sær av málum um ágang ímóti børnum.

Fasta starvsfólkatoymið hevur ábyrgd av leiðslu, fyrisiting, kreppuhjálp til børn og foreldur og skreening/kanning av børnum og ungum. Harafturat arbeiðir toymið í felag við ávísar uttanhýsis samstarvspartar, ið eftir tørvi kunnu verða boðsendir at hjálpa við ítøkiligum málum í Barnahúsinum. Samstarvspartarnir eru sum oftast løgreglufólk og barnalækni.

Eisini kann Barnahúsið eftir tørvi heita á onnur serkøn fólk, tá hetta er neyðugt, til dømis ein tulk, ein málsviðgera frá Familjufyrisitingini ella ein serfrøðing innan eitt ávíst brek hjá barninum ella ungfólkinum.

Harumframt verða boð altíð send eftir málsviðgeranum í avvarðandi barnaverndartænastu, ið fylgir barninum ella tí unga í Barnahúsinum, og sum luttekur í málsgongdini. Í viðgerðini av ítøkiliga málinum virkar hesin málsviðgerin sostatt sum partur av toyminum í Barnahúsinum.

## 14. Virksemi í Barnahúsinum

Barnahúsið setur barnið ella ungfólkið í miðdepilin í øllum sínum virksemi og gjøgnum alla málsgongdina. Hetta merkir, at alt arbeiðið skal fyriskipast so varliga sum gjørligt, og at barnið ella ungfólkið alla tíðina verður kunnað um, hvat fer at henda. Hetta merkir eisini, at greiningar og kanningar skulu setast í verk skjótast til ber, í tann mun hetta hóskar til hvørt einstakt mál og serstøku viðurskiftini í hesum sambandi.

Arbeiðið hjá Barnahúsinum snýr seg um at hjálpa málsviðgeranum hjá avvarðandi barnaverndartænastu at fáa greiðu á viðurskiftunum hjá barninum ella ungfólkinum. Hetta fyri at finna fram til, í hvønn mun barnið ella tann ungi hevur tørv á serkønari hjálp. Neyðugu greiningarnar og kanningarnar verða gjørdar sum liður í barnafakligu kanningini, ið er lýst í § 45 í barnaverndarlógini. Av tí at Barnahúsið í sínum greiningum og kanningum leggur høvuðsdentin á viðurskiftini hjá barninum ella ungfólkinum, ið hava við ágangin ella illgrunan um ágangin at gera, skal málsviðgerin hjá barnaverndartænastuni eisini gera eina fullfíggjaða barnafakliga heildarkanning sambært áðurnevndu § 45. Heildarkanningin verður í slíkum føri gjørd sum liður í málsgongdini í Barnahúsinum. Upplýsingar um viðurskiftini hjá barninum ella tí unga, sum koma fram undir kanningunum í Barnahúsinum, skulu takast við í heildarmetingina av, í hvønn mun barnið ella tann ungi hevur tørv á serkønari hjálp.

Um barnafaklig kanning longu er gjørd, skal barnaverndartænastan í staðin fyri gera eina ískoytiskanning afturat henni, sum er gjørd fyrr. Tá ið slík kanning verður gjørd, skal barnaverndartænastan vera varug við, at viðkomandi skjøl verða send til Barnahúsið í sambandi við kanningina.

Løgreglan nýtir eisini Barnahúsið til videoahoyring av børnum ella ungum í sambandi við eina ítøkiliga rannsókn. Hetta verður gjørt sambært leiðreglunum, sum eru ásettar í Meddelelse - RM 2 – 2007:
https://www.retsinformation.dk/eli/retsinfo/2022/9019

Løgreglan kann eisini nýta Barnahúsið til avhoyring av børnum ella ungfólkum yvir 14 ár, sum ikki skulu videoavhoyrast. Løgreglan luttekur í slíkum førum eisini í viðkomandi samráðum í Barnahúsinum.

Metir løgreglan, at grundarlag er fyri tí, kann hon harumframt biðja um læknakanning. Mannagongdirnar í Barnahúsinum í sambandi við læknakanningar eru ásettar í samstarvsavtaluni millum løgregluna og Landssjúkrahúsið.

Eftir videoavhoyring fáa barnið ella tann ungi og teirra avvarðandi bjóðað kreppuhjálp í Barnahúsinum. Harumframt fær barnið ella tann ungi bjóðað skreening fyri at meta um trivnaðin og í hvønn mun viðkomandi hevur traumueyðkenni. Føst starvsfólk hjá Barnahúsinum veita kreppuhjálpina og skreeningina. Innleiðandi kreppuhjálpin kann sambært avtalu við løgregluna byrja, áðrenn avhoyringin byrjar.

Starvsfólk hjá Barnahúsinum veita barnaverndartænastunum ráðgeving og vegleiðing, tá tað snýr seg um viðgerð av málinum hjá eini familju, ið er ávirkað av ágangi.

Málsviðgerin í avvarðandi barnaverndartænastu hevur gjøgnum alla málsgongdina í Barnahúsinum myndugleikaábyrgd av barninum ella ungfólkinum, og tað er altíð barnaverndartænastan, ið tekur støðu til fyriskipanir, ið ávirka barnið ella tann unga, meðan kanningin í Barnahúsinum fer fram.

## 15. Stig í málsgongdini

Av tí at mál, ið Barnahúsið hevur um hendi, eru sera ymisk, kann stórur munur vera ímillum ymisk mál, tá tað snýr seg um innihaldið og longdina av teimum ymisku stigunum, og tá tað kemur til málsgongdina í Barnahúsinum sum heild.

Málsgongdin í Barnahúsinum kann býtast sundur í seks høvuðsstig:

1. Ráðgeving
2. Byrjan og fyrireiking
3. Løgreglukanning

4. Samráð
5. Kreppuhjálp og skreening/kanning
6. Afturboðan

Niðanfyri er ein neyvari frágreiðing av ymiska virkseminum, sum Barnahúsið kann seta í verk í teim ymisku stigunum.

## 1) Ráðgeving

Um tað bert er veikur illgruni um ágang, og um ivasamt er, í hvønn mun tað er hóskandi at kanna barnið ella tann unga í Barnahúsinum, kann málsviðgerin hjá barnaverndartænastuni seta seg í samband við løgregluna.

Á hesum stigi – tað vil siga áðrenn tað er vorðið greitt, um málið skal viðgerast í Barnahúsinum - hevur løgreglan serkøn fólk at ráðgeva barnaverndartænastunum, læknanum í Barnahúsinum og øðrum starvsfólki í Barnahúsinum ígjøgnum telefon. Í serliga torførum málum, ið ikki kunnu avgreiðast við telefonráðgeving, kann avtalast, at málið verður tikið upp á einum samráði í Barnahúsinum áðrenn avhoyring.

Allar áheitanir um illgruna um ágang móti børnum og ungum skulu fara beinleiðis frá barnaverndartænastunum til løgregluna, sum samskiftir um einstaka málið við atliti til at meta um, hvørt til ber at halda fram við fyriskipanum, ella tað er grundalag fyri at melda eitt revsumál til løgregluna

Viðvíkjandi skráseting hjá løgregluni á hesum stigi, verður einans skrásett, hvat áheitanin snúði seg um, og hvør barnaverndartænasta hevur vent sær til løgregluna. P-tøl, nøvn og líknandi verður ikki skrásett.

Onnur viðkomandi fakfólk, so sum lærarar, námsfrøðingar ella heilsufrøðingar, ið bera illgruna um ágang, skulu leita sær hjálp frá avvarðandi barnaverndartænastu ella nýta aðrar ráðgevingarmøguleikar.

Barnahúsið veitir ikki ráðgevandi stuðul til vanligar borgarar. Um eitt barn ella ungfólk, ella foreldur ringja til Barnahúsið at fáa telefonráðgeving, skal Barnahúsið hjálpa tí, sum ringir at fáa samband avvarðandi barnaverndartænastu, ið kann veita ráðgeving.

## 2) Byrjan og fyrireiking

Eitt mál kann byrja hjá barnaverndatænastuni, hjá løgregluni ella í sjúkrahúsverkinum, men tað er barnaverndartænastan, ið formliga byrjar eitt barnahúsmál við at melda málið til løgregluna við at senda løgregluni áheitanarskjal við Barnahúsinum cc. Barnahúsið stovnar og skrásetir málið sum barnahúsmál.

Harumframt kunnu mál í Barnahúsinum verða viðgjørd eftir tveimum ymiskum fortreytum: sum eitt fyrireikað mál ella sum eitt bráðfeingis mál. Her veldst um

innihaldið og skundin, ið málið hevur. Er ágangurin til dømis júst uppdagaður ella framdur, og rannsóknin krevur, at avhoyring og læknakanning av barninum ella tí unga verður gjørd skjótast gjørligt, so kann málið verða viðgjørt bráðfeingis. Bráðfeingismál krevja skjóta meting og møguliga bráðfeingis avgerðir, eitt nú fyri at verja barnið ella ungfólkið, ella veita sjúkraviðgerð (sí partin um málsgongdir í bráðfeingis málum).

Niðanfyri verða málsgongdirnar lýstar fyri mál, ið byrja ávikavist hjá barnaverndartænastuni, hjá løgregluni og í sjúkrahúsverkinum.

**Mál, sum byrja hjá barnaverndartænastuni**

Barnaverndartænasturnar kunnu fáa upplýsingar ella illgruna um, at eitt barn ella ein ungur hevur verið fyri ágangi, antin ígjøgnum eina áheitan frá barninum ella ungfólkinum sjálvum ella frá øðrum persóni. Eisini kunnu barnaverndartænasturnar fáa vissu ella illgruna um ágang, tá ein barnafaklig kanning verður gjørd.

Í fyrstu syftu metir barnaverndartænastan sjálv, um málið skal meldast til løgregluna. Í hesum sambandi kann barnaverndartænastan heita á løgregluna at fáa ráð og vegleiðing um at melda viðvíkjandi fráboðanum og øðrum viðurskiftum í sambandi við illgruna um ágang.

Tá barnaverndartænastan meldar mál til løgregluna, skal hon senda áheitanarskjal við øllum viðkomandi skjølum í málinum til at lýsa grundarlagið fyri illgruna, herundir fráboðanir frá stovnum, frásagnir frá møguligum barnasamrøðum, persónligar journalir, soleiðis at løgreglan kann meta um fráboðanina, og taka støðu til, hvørt órættaði/a skal videoavhoyrast og um tað eru serstakir spurningar ella kanningararbeiði sum skal handfarast í fyrstu atløgu, møguliga í samstarvi við avvarðandi barnaverndartænastu. Málið verður sent løgregluni við cc til Barnahúsið.

**Mál, sum byrja hjá løgregluni**

Løgreglan kann fáa kunnleika um, at eitt barn ella ein ungur hevur verið fyri ágangi gjøgnum fráboðan ella gjøgnum rannsóknarvirksemi. Í slíkum førum boðar løgreglan avvarðandi barnaverndartænastu frá, og barnaverndartænastan knýtur ein málsviðgera til málið.

Metir løgreglan ikki, at talan er um eitt løgreglumál, tekur barnaverndartænastan støðu til, hvussu málið skal handfarast. Barnaverndartænastan kann fáa ráðgeving frá Barnaverndarstovuni.

**Mál, sum byrja í sjúkrahúsverkinum**

Sjúkrahúsverkið kann varnast, at eitt barn ella ungfólk hevur verið fyri ágangi, um tað eitt nú kemur á skaðastovuna, ella um illgruni stendst um ágang, tá barnið ella tann ungi fær aðra læknafrøðiliga viðgerð (t.d. á Barnadeildini ella í ungdómspsykiatriini).

Í slíkum førum fráboðar sjúkrahúsverkið avvarðandi barnaverndartænastu, um stúranina, vissuna ella illgrunan, og barnaverndartænastan (í samráði við løgregluna) tekur støðu til, um Barnahúsið skal nýtast til víðari kanning, greining og greiðing av málinum.

## 3) Løgreglukanning

Fráboðanin verður so vítt gjørligt visiterað sama dag ella fyrsta arbeiðsdagin eftir, at málið er meldað til løgregluna – bæði við fyriliti fyri at nøkta tørvin hjá barninum ella ungfólkinum, at halda freistir osfr.

Støða verður tikin til, um barnið skal videoavhoyrast, ella um nærri kanning skal gerast, áðrenn møgulig videoavhoyring kann fara fram.

Metir løgreglan tað vera viðkomandi at videoavhoyra barnið ella ungfólkið, setir hon seg í samband við Barnahúsið og avvarðandi málsviðgera, sum skal vera til staðar undir avhoyringini. Løgreglan metir harumframt, um grundarlag er fyri at biðja um læknakanning, og løgreglan hevur eisini ábyrgd av, at ein verji verður tilnevndur til tann, ið er undir illgruna, og at ein advokatur verður tilnevndur til barnið ella ungfólkið. Videoavhoyringar skulu gerast skjótast gjørligt og, um tað á nakran hátt ber til, minni enn eina viku eftir fráboðanina um ágang.

Fyrsta sambandið, sum løgreglan hevur við barnið ella ungfólkið, er vanliga dagin fyri sjálva videoavhoyringina, tá ið videoavhoyrarin fer á heimavitjan. Dagin eftir heimavitjanina kemur barnið ella ungfólkið til videoavhoyring í Barnahúsinum saman við foreldrum ella øðrum avvarðandi. Tey, ið eru við til videoavhoyring - herundir barnaverndartænasta og tann, ið kemur við barninum - kunnu ikki vera vitni í rættinum.

### Bráðsamráð

Í serligum førum kann tørvur vera á, at partarnir hittast til samráð fyri at leggja til rættis málsgongdina í Barnahúsinum, *áðrenn* avhoyring verður. Herundir: trygdarmeting, læknakanning, videoavhoyring, kanning av tørvinum á kreppuhjálp og um tørvur er á bráðfeingis fyriskipan, t.d. at barnið skal takast úr heiminum, samvera steðga o. líkn.

### Videoavhoyring

Tá løgreglan hevur tikið avgerð um, at barnið ella tann ungi skal videoavhoyrast, kunnar løgreglan hesar partar um avhoyringina: Barnahúsið, barnaverndartænastuna og foreldramyndugleikan, um tey ikki eru undir illgruna.

Løgreglan syrgir fyri at advokatar, verjar og annað verða sett á málið.

*Nærskyld*
Í málum, har foreldur ella onnur nærskyld eru undir illgruna, kann vera neyðugt at "trygleikapersónur" (t.d. pedagogur ella lærari) kemur við barninum frá stovninum/skúlanum, uttan at nærskyld frammanundan eru kunnað. Í hesum førum er vanligt, at sosialráðgevin hjá barnaverndartænastuni er saman við tryggleikapersónininum, tá barnið kemur. Foreldramyndugleikin verður kunnaður av løgregluni, áðrenn barnið ella tann ungi verður avhoyrt.

Um so er, at foreldramyndugleikin setir seg ímóti avhoyring, verður mett, um videoavhoyring skal fara fram eftir avgerð av rættinum.

*Ikki nærskyld*
Í øðrum málum, har illtonkti/a ikke er nærskyld, verður foreldramyndugleikin kunnaður um ætlaðu videoavhoyringina, og avhoyrarin vitjar barnið í heiminum fyri at skapa best møguliga sambandið áðrenn avhoyringina.

## 4) Samráð

Samráð verður skjótast til ber eftir, at yvirlit er gjørt yvir málið, og vanliga eftir at videoavhoyring hevur verið.

Sum útgangsstøði verða samráð týsdag fyrrapart.

Á samráði eftir videoavhoyring luttaka:

- Løgregla
- Barnaverndarstovan, sum umsitir Barnahúsið
- Barnalækni
- Avvarðandi barnaverndartænasta

Á samráðnum kunnar løgreglan um status og víðari tilgongdina av málinum. Hereftir avtala partarnir, hvussu víðari skal farast fram viðvíkjandi kreppuhjálp til foreldur, barn og møgulig onnur avvarðandi, og um møguliga skreening av trivnaði hjá barninum og møgulig traumueyðkenni.

Læknin metir um, í hvønn mun tørvur er á læknaligaru viðgerð og kanning av barninum ella ungfólkinum.

Ásett verður eisini, um løgreglufólkið hjá SSP skal takast upp í málið.

Upprit verður gjørt av samráðnum, har avtalur og niðurstøður framganga. Føstu starvsfólkini í Barnahúsinum hava ábyrgd av at kalla inn til samráð, gera upprit og at senda pørtunum hetta til viðmerkingar.

## 5) Kreppuhjálp og skreening/kanning

Kreppuhjálp til barnið ella tann unga og nærmastu avvarðandi verður veitt, um tað verður hildið hóskandi. Kreppuátakið í Barnahúsinum veldst um slagið av ágangi, um aldurin og búningarstigið hjá barninum ella tí unga, og um støðuna og atburðin hjá foreldrunum ella avvarðandi hjá barninum ella tí unga. Royndir benda á, at kreppuhjálpin tilsamans plagar at fevna um 6-8 samrøður, ið eru býttar ímillum barnið ella ungfólkið og foreldur ella onnur avvarðandi. Hetta er ein heildarmeting, og hvussu nógvar samrøðurnar verða, veldst um ítøkiliga málið.

Arbeiðið hjá Barnahúsinum fevnir um at veita ráðgeving og stuðul til foreldur og onnur avvarðandi hjá barninum ella tí unga við tí fyri eyga at endurskapa trivnaðin og vanliga gerandisdagin hjá barninum ella ungfólkinum. Eisini fevnir arbeiðið um at skreena barnið fyri trivnað og um barnið er í menning, og um møgulig traumueyðkenni eru.

## 6) Afturboðan

Málið verður lokað í Barnahúsinum, tá skreeningin av barninum og kreppuhjálpin til barn og foreldur eru liðug.

Afturboðan verður send til avvarðandi barnaverndartænastu. Afturboðanin inniheldur meting um trivnaðin hjá barninum, og um barnið hevur møgulig traumueyðkenni. Eisini kann afturboðanin innihalda møguligt tilmæli um hvørjar fyriskipanir eiga at verða settar í verk fyri at skapa trivnað og menning hjá barninum og familjuni.

Úrslitið av afturboðanini kann verða løgd sum ískoyti til kanningina sambært § 45, og sum gerst grundarlag fyri framhaldandi viðgerðini av málinum (uttanfyri Barnahúsið), ið barnaverndartænastan hevur ábyrgd av.

Framhaldandi fyriskipanir til barnið ella ungfólkið verða játtaðar sambært ásetingunum í barnaverndarlógini. Tað er barnaverndartænastan, ið hevur heimild at taka avgerð um fyriskipanir við støði í afturboðanini, sum er gjørd í Barnahúsinum.

Verður tað mett neyðugt, innkallar Barnahúsið til endasamráð.

## 16. Málsgongdir í bráðfeingis málum

Í ávísum málum um ágang kann tað vera alneyðugt at seta í verk bráðfeingis tiltøk. Talan kann til dømis vera um mál, har løgreglan av rannsóknarávum metir tað vera neyðugt at gera eina læknakanning skjótast gjørligt. Í hesum førum boðar løgreglan barnaverndartænastuni og lækna frá, og kanningartíð verður avtalað. Barnaverndartænastan setir seg síðan í samband við Barnahúsið. Bráðfeingis mál kunnu eisini vera mál, har tørvur er á bráðfeingis sjúkuviðgerð ella vernd av barninum ella ungfólkinum, sí §§ 17 og 18 lógini um barnavernd um bráðfeingis avgerðir, læknakanning og viðgerð.

Í bráðfeingis málum kann málsviðgerin hjá barnaverndartænastuni fáa ráðgeving um, hvørjar kanningar o.a. eru neyðugar at gera alt fyri eitt, umframt ráðgeving um at fyriskipa hesi tiltøk.

Í fyrstu syftu ræður um, at málsviðgerin saman við Barnahúsinum tekur støðu til, hvørji tiltøk eru bráðneyðug og eiga at verða sett í verk beinanvegin, til dømis fyri at fyribyrgja meira ágangi ella at veita barninum ella ungfólkinum krepphjálp.

Harumframt kann starvsfólkið hjá Barnahúsinum hjálpa málsviðgeranum við at taka støðu til, hvørjir serfrøðingar skulu boðsendast beinanvegin, og kann eisini hjálpa málsviðgeranum at senda boð eftir teimum.

Harafturat ber til hjá løgregluni at fáa atgongd til videoavhoyringshølini í Barnahúsinum uttan fyri vanligu upplatingartíðirnar hjá húsinum.

## 17. Tvørfakliga samstarvið

Myndugleikar og starvsfólk, ið arbeiða við einum ítøkiligum máli í Barnahúsinum, kunnu lata upplýsingar sínámillum um málið, sambært § 10a í barnaverndarlógini.

Endamálið við at samstarvspartarnar lata upplýsingar sínámillum í Barnahúsinum er at verja barnið ella ungfólkið, millum annað við at sleppa tí undan at skula endurtaka frágreiðing sína um eitt nú sjálvar hendingarnar, kropsligar skaðar og aðrar upplýsingar fyri ymiskum myndugleikum.

Ein týdningarmikil partur av Barnahúsinum er sostatt, at fakfólk og myndugleikar, sum samstarva um eitt ítøkiligt mál, kunnu byggja upp eina felags vitan um málið, og at tey harvið kunnu samstarva og samskipa arbeiði sítt við tí fyri eyga, at øll viðurskifti í málinum verða kannað, og at barnið ella ungfólkið fær so vælskikkaða og heildarskipaða hjálp og viðgerð, sum til ber.

Harumframt gevur heimildin til at lata upplýsingar sínámillum eisini starvsfólkunum møguleika til at menna sínar royndir og byggja upp eitt vitanarstig og yrkisføri, ið felags ágóði fæst av.

Fyri at menna og varðveita tvørfakligu serfrøðina í málum um ágang skipar Barnahúsið fyri føstum samráðsfundum. Hesir fundir eru ikki knýtt at nøkrum ávísum máli, men hava í staðin fyri til endamáls at menna royndirnar og varpa ljós á ymiskt, ið hevur vakt ans í ávísum málum, umframt at eftirmeta og læra frá málum, ið eru um at enda sína gongd í Barnahúsinum. Tey, ið taka lut í hesum fundum, eru føstu starvsfólkini hjá Barnahúsinum og umboð frá ávikavist løgregluni og sjúkrahúsinum.

## 18. Samstarvsavtalur og mannagongdir

Barnaverndarstova Føroya hevur samstarvsavtalu um Barnahúsið við Almannamálaráðið, Kommunufelagið, Føroya Landfúta og við Landssjúkrahúsið.

Starvsfólkini innan tey umsu arbeiðsøkini hava niðurskrivaðar nágreiniligar mannagondir um teirra leiklut í Barnahúsinum. Endamálið við niðurskivaðum mannagongdum er at tryggja og menna serkøna yrkisførleikan, ið skal eyðkenna uppgávuloysnirnar í Barnahúinum. Samstundis eru mannagongdirnar eitt fakligt amboð, ið skal tryggja, at Barnahúsið veitir eins dygdargoð átøk til øll børn og ung, sama hvar í landinum mál teirra byrjar.

Mannagongdirnar verða javnan dagførdar og endurskoðaðar.

## 19. Førleikamenning í Barnahúsinum

Føstu starvsfólkini hjá Barnahúsinum hava - umframt sína serligu útbúgving - viðkomandi royndir innan mál um ágang ímóti børnum og ungum.

Starvsfólkini luttaka javnan í førleikamenning innan økið, eins og tey luttaka í útlendskum samstarvi.

## 20. Dátuskráseting og skjalfesting

Barnahúsið skal skráseta upplýsingar um børn og ungfólk, ið eru viðgjørd í Barnahúsinum. Hesar upplýsingar verða goymdar á Barnaverndarstovu Føroya og verða einans nýttar til hagtøl.

Barnahúsið virkar við støði í serstakari lógarheimd í barnaverndarlógini § 10a. Málsgongdin í málum í Barnahúsinum er lýst her: http://www.bvs.fo/barnahusi%C3%B0/mal-i-barnahusinum/malsgongd

## Hvussu goyma vit upplýsingar?

Eru upplýsingarnar elektroniskar, verða tær goymdar í tryggari skipan. Hetta er galdandi bæði fyri upplýsingar, ið Barnahúsið savnar inn, og fyri upplýsingar ið barnahúsmálum fær inn í samband við eitt mál.

Í førum har málsviðgerðin ikki er elektronisk, tryggja vit, at tað er møguligt at steingja upplýsingarnar inni, og hava eina trygga mannagongd fyri, at bert viðkomandi starvsfólk hava atgongd til upplýsingarnar.

## Hvussu leingi goyma vit persónsdátur?

Tá vit goyma persónsupplýsingar, fylgja vit galdandi reglum fyri, hvussu leingi vit mega goyma tær. Hvussu leingi vit goyma upplýsingarnar, valdast hvat slag av máli talan er um. Í summum førum hava vit skyldu til at goyma og varðveita upplýsingar til eftirtíðina.

Barnaverndarstovan strikar upplýsingar, tá skyldan at goyma upplýsingar gongur út, og eitt møguligt arkiveringskrav er uppfylt.

## Víðarigeving

Barnahúsið kann, og skal í flestu førum, lata upplýsingar víðari til aðrar partar, sum t.d. løgreglu, ákæruvald, sosialar myndugleikar, heilsumyndugleikar, løggild heilsustarvsfólk og starvsfólk í Barnahúsinum í sambandi við mál í Barnahúsinum.

Víðarigeving av upplýsingum hevur í flest øllum førum heimild í lóg. Í teimum førum har víðarigeving krevur samtykki, innheinta vit samtykki, áðrenn upplýsingarnar verða givnar víðari.

## Rættindi

Tann, ið málið snýr seg um, hevur eina røð av rættindum í sambandi við viðgerðina hjá Barnahúsinum av hansara/hennara upplýsingum:

- Rætt til innlit, rætt til kunning, rætt til at mótmæla viðgerð, rætt til at fáa upplýsingar rættaðar, strikaðar ella stongdar, um upplýsingarnar eru rangar, villeiðandi ella eru viðgjørdar ímóti lóg ella ásetingum, heimilaðum í lóg.

Rættindi eru ikki treytaleys, og Barnahúsið hevur ikki altíð skyldu at ganga teimum á møti; í summum førum kann Barnahúsið ikki sbrt. lóg.

Til ber at fáa meiri at vita um rættindi sum skrásett við at seta seg í samband við Barnahúsið. Eisini ber til at lesa meiri um rættindi á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum, www.dat.fo.

## 21. Aðrar viðkomandi reglur um at lata upplýsingar sínámillum og samstarva

Heimildin at lata upplýsingar sínámillum sambært § 10a í barnaverndarlógini skal síggjast í mun til aðrar galdandi ásetingar um tagnarskyldu í barnaverndarlógini, fyrisitingarlógini, persónsupplýsingarlógini og í rættargangslógini.

Tað eru hesar ásetingar, ið verða umrøddar í stuttum í hesum parti. Endamálið er at geva eitt yvirlit yvir reglurnar annars, tá talan er um at lata sínámillum upplýsingar, og sum skulu síggjast í mun til § 10a í barnaverndarlógini og tað høpið, sum henda heimild er ein partur av.

### Barnaverndarlógin

**Herd fráboðanarskylda**

Í § 14 í barnaverndarlógini verður ásett, at øll, sum í starvi sínum hava við børn at gera og sum í hesum sambandi fáa kunnleika til viðurskifti ella hava orsøk til at halda, at viðurskifti eru, sum krevja, at komið verður uppí eftir hesi lóg, hava skyldu til navngivin at boða barnaverndartænastuni frá hesum. Fráboðanarskyldan sambært hesum stykki verður sett fram um ásetingarnar í øðrum lógum um tagnarskyldu í viðkomandi yrkjum.

### Fyrisitingarlógin

**Tagnarskylda**

Tey sum starvast innan almennu fyrisitingina hava sambært § 26 í fyrisitingarlógini tagnarskyldu, sbrt. borgarligu revsilógina § 152 og §§ 152c-l52f, tá ein upplýsing við lóg ella aðrari gildari áseting hevur trúnaðarfrámerki, ella tá tað annars er neyðugt at halda hana loyniliga fyri at verja serstøk fyrilit viðvíkjandi almennum ella privatum áhugamálum.

Ásetingarnar um tagnarskyldu skulu millum annað tryggja, at sínámillum upplýsingar um børn og ung og viðurskifti teirra heima við hús bert verða latnar millum fakfólk, tá hetta er neyðugt, og tá tað hevur eitt sakligt endamál.

Í § 26 í fyrisitingarlógini verður nevnt, hvørji fyrilit kunnu gera seg galdandi, at upplýsingar eru í trúnaði og sostatt eru fevndir av tagnarskyldu.

Av serligum týdningi í sambandi mál um ágang eru fyrilitini fyri fyribyrging, kanningararbeiði og at greiða lógarbrot, vernd av tí ákærda eins og upplýsingar um persónlig viðurskifti hjá einstøkum persónum.

Ásetingin í § 10, stk. 2 í barnaverndarlógini ber tó, hóast tagnarskylda er áløgd sambært fyrisitingarlógini, í sær, at upplýsingar kunnu latast sínámillum, *tá umhugsni fyri viðurskiftum barnsins fer fram um fyrilitið fyri teimum áhugamálum, ið geva grund fyri dyljan.*

## Persónsupplýsingarlógin

Persónsupplýsingarlógin snýr seg um handfaring av persónsupplýsingum. Skilt verður millum, um upplýsingarnar eru viðkvæmar ella ikki, sbr. § 10 í lógini.

**Forrættindi**
Um ásetingar í øðrum lógum enn í persónsupplýsingarlógini bøta um rættarstøðuna hjá einum persóni, ið sínámillum upplýsingar verða latnar um, skulu hesar ásetingar nýtast, soleiðis sum § 4 í persónsupplýsingarlógini fyriskrivar.

Tað er ætlanin við heimildini í § 10a í barnaverndarlógini um at lata sínámillum upplýsingar uttan samtykki, at henda áseting kemur fram um ásetingarnar í persónsupplýsingarlógini.

Í tann mun, at § 10a í barnaverndarlógini ikki kann nýtast, má verða mett um, hvørt sínámillum upplýsingarnir kunnu latast eftir persónsupplýsingarlógini.

**Viðkvæmar upplýsingar**
Í § 2, pkt. 9 í lógini verður nevnt, hvat skilst við viðkvæmar upplýsingar, og í § 10 verður ásett, hvussu hesar skulu handfarast.

§ 9, pkt. 5 í persónsupplýsingarlógini snýr seg millum annað um viðgerðina hjá almennu umsitingini – her í millum at lata upplýsingar víðari um revsiverd viðurskifti, munandi sosialar trupulleikar og onnur heilt privat viðurskifti.

## Rættargangslógin

**SSP-samstarvið**
Ein onnur heimild til at lata upplýsingar sínámillum um heilt privat viðurskifti hjá børnum og ungum er at finna í § 115 rættargangslógini, ið millum annað gevur heimild til at lata upplýsingar sínámillum innan SSP-samstarvið. Henda áseting gevur skúlum, sosialum myndugleikum og løgreglu møguleika at lata upplýsingar sínámillum, um hetta er neyðugt fyri samstarvið, ið skal fyribyrgja brotsverkum. Upplýsingar kunnu sambært hesi áseting latast millum samstarvspartarnar, uttan at samtykki er givið frammanundan.